




*Katrin á Neystabø, nýggjur átakssam-skipari hjá Amnesty í Føroyum*

## Hví skulu føroyingar involvera seg í Amnesty?

- Fyri at gera mannarættindini sjónlig í føroyska samfelagnum.

**GER FØROYSKI INNSATSURIN NAKRAN MUN Í STÓRA SAMANHANGINUM?**

- Ja, hann ger stóran mun. Amnesty er ein altjóða felagsskapur, sum samskipar øll síni átøk, og Føroyar telja í grundini sum eitt heilt land á listanum hjá Amnesty yvir lond, sum eru við í teimum ymsu átøkunum. Og tað ger ótrúliga stóran mun fyri einstøk fólk, sum síggja at sjálvt í einum lítlum og fjarskotnum staði sum Føroyum verður hugsað um tey.

**HVUSSU NÓGV SNÝR ARBEIÐIÐ Í AMNESTY SEG UM AT GEVA SÆR SJÁLVUM GÓÐA SAMVITSKU?**

- Arbeiðið hjá Amnesty snýr seg um at seta altjóða mannarættindi á dagskránna. Tað er sjálvandi betur at gera okkurt enn einki at gera. Vit skulu øll sovna og sova, og tí kunnu vit eisini hjálpa okkara egnu samvitsku, men tað skal ikki verða høvuðsorsøkin fyri, at vit luttaka í átøkum hjá Amnesty. Vit skulu halda tað verða meiningsfult og gera tað, tí vit vilja stríðast fyri altjóða mannarættindum hjá tí einstaka - bæði í Føroyum, men serliga í fátæka partinum av heiminum har størstu mannarættindabrotini verða framd.

# Umsetiligtheit




Ríkisumboðið hevur trupulleikar við at umseta nýggju føroysku stýrisskipanarlógina til danskt

## Í MORGIN

**9-12 °C**



1-6 m/s 1-6 m/s

Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum. turt og sólkglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 9 og 12 stig.

## MIKUDAGIN

**5-8 °C**



5-10 m/s 4-9 m/s

Lot til andøvsgul av vestri og sólglottar, men um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing og frískar vindin nakað og okkust ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.

## HÓSDAGIN

**4-7 °C**



6-11 m/s 6-11 m/s

Gul til stívt andøvsgul av vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini ælingur, sum frálíður kavi og hitini millum 1 og 5 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst. 1033 hPa. á 57N-25V kemur hendavegin og mennist. Kuldabrúgvin yvir Føroyum fer í landsynning.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið í útsynning úr Føroyum fer spakuliga norðureftir og viknar nakað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 1 | Tromsø | 0 | Moskva | 10 | Athen | 19 |
| Reykjavík | -1 | Bergen | 2 | Berlin | -- | Beijing | 15 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | 1 | Paris | 13 | New Dehli | 33 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | 5 | Madrid | 10 | Bangkok | 35 |
| Aberdeen | 2 | Keypmannah. | 9 | Róm | 17 | Sydney | -- |
| London | 10 | Helsinki | 2 | Malorca | 18 | New York | 6 |

## VESTFALLSKYRRINDI

9. apríl Mánin longst frá jørðini
14. apríl Tendring
24. apríl Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. apr | 05:56 | 18:14 | 04:56 | 17:14 | 05:11 | 17:29 | 07:56 | 20:14 | 08:56 | 21:14 | 04:11 | 16:29 | 03:11 | 15:29 | 06:11 | 18:29 | 07:11 | 19:29 | 05:41 | 17:59 | 06:56 | 19:14 |
| 13. apr | 06:33 | 18:53 | 05:33 | 17:53 | 05:48 | 18:08 | 08:33 | 20:53 | 09:33 | 21:53 | 04:48 | 17:08 | 03:48 | 16:08 | 06:48 | 19:08 | 07:48 | 20:08 | 06:18 | 18:38 | 07:33 | 19:53 |
| 14. apr | 07:13 | 19:34 | 06:13 | 18:34 | 06:28 | 18:49 | 09:13 | 21:34 | 10:13 | 22:34 | 05:28 | 17:49 | 04:28 | 16:49 | 07:28 | 19:49 | 08:28 | 20:49 | 06:58 | 19:19 | 08:13 | 20:34 |
| 15. apr | 07:54 | 20:15 | 06:54 | 19:15 | 07:09 | 19:30 | 09:54 | 22:15 | 10:54 | 23:15 | 06:09 | 18:30 | 05:09 | 17:30 | 08:09 | 20:30 | 09:09 | 21:30 | 07:39 | 20:00 | 08:54 | 21:15 |
| 16. apr | 08:38 | 21:01 | 07:38 | 20:01 | 07:53 | 20:16 | 10:38 | 23:01 | 11:38 | - | 06:53 | 19:16 | 05:53 | 18:16 | 08:53 | 21:16 | 09:53 | 22:16 | 08:23 | 20:46 | 09:38 | 22:01 |